| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 03. mars 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 02/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 03. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. februar 2011 um innkalling til fundar. Talan er um fundin 24. Februar 2011, sum varð avlýstur sambært skriv, dagfest 17. februar 2011 og nýggjur fundur ásettur.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaaard, sum hevði forfall til fundin.
Dánjal Vang hevur við teldupostl, dagfestum 03. mars 2011 kl. 15,07 boðað frá, at hann vegna fundarvirkasemi ikki kann koma á býráðsfundin. Sonni á Horni møtti ikki.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 03/2011.**

**Umsókn frá Sámal Petur Petersen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503u í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Sámal Petur Petersen, Dalsvegur 28, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, dagfest 09. februar 2011 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503u í Stovugerði 20 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 15. februar 2011 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Har grivið verður móti granna skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at bakið verður tryggjað á nøktandi hátt og ikki hevur størri hall enn 1:1,25, og skráin er inni á ogn hansara.
8. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (7-0).

**Mál nr. 04/2011.**

**Val av nýggjum formanni fyri løgtings- og fólkatingsvalstýrið fyri Hellurnar valdømi.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 29. desember 2008 í sambandi við skipan valt Jens Petur Jensen, Rættarvegi 19, 695 Hellurnar sum lim og formanni fyri løgtings- og fólkatingsvalstýrið fyri Hellurnar valdømi fyri tíðarskeiðið 01. januar 2009 til 31. desember 2012.

Jens Petur, sum føddur varð á Hellunum tann 01. november 1945 doyði tann 03. november 2009, og eftir hetta hevur løgtings- og fólkatingsvalstýrið verið uttan formann.

Nú bæði fólkatings- og løgtingsval stunda til, so verður við skrivi frá fyrisitingini, dagfestum 14. februar 2011 heitt á býráðið um at velja nýggjan formann fyri omanfyri nevndu valstýri á Hellunum fram til verandi kommunuvalskeið er úti tann 31. desember 2012.

Fyrisitingarliga verður mælt býráðnum til ikki at økja talið av limum, sum nú eru 4 upp í 5, men at ein limur í valstýrinum verður valdur til formann, hetta grundað á, at sera fáir veljarar eru á Hellunum (18), og at tað á ongan hátt er neyðugt at hava 5 limir, tá ið Fuglafjarðar valdømi júst hevur sama tal + ein eykalim fyri hvønn limin við omanfyri 1100 við valrætti.

Fyrisitingin mælir í skrivinum býráðnum til at velja ***Jórun Eið Johannesen*** sum forkvinnu fyri løgtings- og fólkatingsvalstýrini restina av inniverandi kommunuvalskeiði, og at nevndin kemur at verða mannað við teimum 4 limunum, sum eru á lívi, sum valdir vórðu 29. desember 2008 nevniliga:

- Atli Johannesen, Rættarvegur 18, 695 Hellurnar
- Símun Hans Jacobsen, Rættarvegur 8, 695 Hellurnar
- Hansina Kerá, Rættarvegur 20, 695 Hellurnar
- Jórun Eið Johannesen, Rættarvegur 18, 695 Hellurnar

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini, at velja Jórun Eið Johannesen sum forkvinnu í løgtings- og fólkatingsvalstýrunum fyri Hellurnar valdømi inniverandi kommunuvalskeið, t.v.s. fram til 31. desember 2012, somuleiðis sum samtykt varð, at valstýrslimirnir skulu verða 4 í tali og ikki 5, sum samtykt varð tikin um á skipanarfundinum 29. desember 2008. (7-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.25

Elisabeth D. Eidevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus S. Midjord

Gordon M. Petersen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen